# Blaðtekning og fólkaræði í Miðlahúsinum

TÍÐINDASKRIV

Í kvøld klokkan 19 verður almennur pallborðsfundur í Miðlahúsinum í Vágsbotni, har fokus verður sett á blaðtekningina og fólkaræðið. Undir heitinum ”Blaðtekning og fólkaræði - týdningurin blaðtekningin hevur fyri almenna orðaskiftið í Norðurlondum” fara fýra fólk at greiða frá og leggja upp til orðaskifti. Í panelinum eru norðurlendskir blaðteknarar umframt Tórbjørn Jacobsen, fyrrverandi mentamálaráðharri og løgtingslimur og Eyðun Andreassen, fólkalívfrøðingur.




Lesið Sosialin so eru tit við



**Vestmanna skúli**
Toftavegur 12, FO-350 Vestmanna · Føroyar
Tlf. 298 470100 · Fax +298 470101 · e-mail: vestmanna@skulin.fo

## Lærarastørv í Vestmanna skúla

Tíðaravmarkað størv í Vestmanna skúla verða lýst leys til setanar frá **1. august 2006.**

**Søkt verður eftir 5 lærarum, fýra í fulltíðarstarv og einum í parttíðarstarv**
- fyri lærarar í farloyvi, barnsburðarfarloyvi, lækkað tímatal og avlopstímar

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum

**Harumframt skulu lærararnir hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinum/lærugreinaøkjum:**
- undirvísa gentum og dreingjum í ítrótti og í svimjing, undirvísa á ítróttarbreyt og hava ítrótt sum linjulærugrein
- undirvísa í týskum og enskum
- undirvísa í náttúru/tøkni, alisfrøði og evnafrøði
- undirvísa í træ- og jarnsmíð og motorlæru
- undirvísa í rokning/støddfrøði

vera flokslærarar

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum.

Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

Tó kunnu lærarалesandi, ið lúka prógv í summar, eisini søkja størvini.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er Vestmanna skúli. Tey, ið sett verða, eiga at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Størvini verða lønt í lønarflokki 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Størvini verða sett sum tíðaravmarkað størv fyri skúlaárið 2006 - 2007.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 8. mai 2006, kl. 16.00.**

Fleiri upplýsingar um størvini fært tú við at ringja til Vestmanna skúla tlf. 470100 ella til skúlastjóran tlf. 424449 ella við at senda teldupost til skúlastjóran olavur.winther@skulin.fo

**Vestmanna Skúli** hevur komandi skúlaár um 212 næmingar og um 24 lærarar.
Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/ves/

Vestmanna Skúli er kendur fyri at vera næmingavinarligur og grønur skúli. Skúlin arbeiðir annars í løtuni við hesum evnum: at menna trivnaðin, byrjanarundirvísingina, samstarvið við vinnulívið, tann opna skúlan og at geva næmingunum fjølbroyttar avbjóðingar.



**Fiskimálaráðið**
*Fiskiveiðieftirlitið*

## 1. meistari til Fiskiveiðieftirlitið

Eitt starv sum 1. meistari við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verður hervið lýst leyst, at seta sum skjótast.

**Starvið fevnir m. a. um hesar uppgávir:**
- Vaktgangandi maskinmaður sambært ásetingunum frá maskinstjóra
- Skipa fyri og luttaka í dagliga arbeiðinum í maskinrúmunum, og rúmum sum beinleiðis hava samband við maskinrúm, umframt rúm har maskinútbúnaður er
- Skipa fyri viðlíkahaldi sambært viðlíkahaldsskipan
- Annað fyrifallandi viðlíkahaldsarbeiði

**Førleikakrøv:**
- Vinnubræv sum Skipsmaskinmeistari á 1. stigi (STCW-regl. III/2 as 2nd Engineer).
- Fyrimunur við 3 ára maskinmeistaraútbúgving
- Heilsuváttan fyri sjómenn
- Leiðsluroyndir
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa
- Aldur og heilsu til at gerðast kavari. Fyrimunir men ikki krav.

**Setanartreytir:**
Starvið er tænastumannastarv og lønt í 31. lønarflokki sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarfelagið. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnum undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið.

Starvsheiti er 1. meistari.

Tann ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipa til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir við cv, saman við avriti av prógvum, vinnubrævi og møguligum viðmælum, skulu verða Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 10. mai 2006 kl. 12.00.

Umsóknirnar skulu sendast til :

**Fiskiveiðieftirlitið**
postsmoga 347
110 Tórshavn

*Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 35 30 30 og tosa við Elmar Højgaard, leiðara.*